sum Twilight, eitt av kendu danisorkestrunum í landinum. Og her byrjaði dysturin millum djúpa kontriskaldskapin og heiladeyða dansitónleikin. Tað var sum hin djevulski banjo-dysturin í *Deliverance*, við ánna burturi í óbygdum. Sitandi í stólunum í stásiligu Høllini í Norðurlandahúsinum sluppu vit, tannleysu hillbillies, at lúra inn í eitt avdankað dansihøli, har eitt ferðandi dansiorkestur av handahógvi blaðar í lívsins stóru sangbók og ikki hevur ánilsi av, hvør eigur sang, tekst, ella lag.

Kontriskaldskapur er eyðkendur av eini markleysari virðing fyri tí ektaða og upprunaliga, beint úr heimliga túninum. Hetta sást ikki aftur hjá Rannvá og hennara stíli at framføra. Gamaní, røddini bilti einki og nú var trummuljóðið munin betur. Um tað var nýggi trummusláarin, ella ljóðmaðurin, ið gjørdi tað, veit eg ikki.

Triðja og seinasta partin átti Ragnar í Vík. Twilight fóru av pallinum og inn komu teir somu, ið byrjaðu konsertina saman við Halli. Alis, kona Ragnar, var fyriskipari og frásøgufólk. Óneyðuga fjálturstungin gekk hon til og frá. Við sanginum "Mansion on the Hill" kom Ragnar – einastu ferð – gjøgnum ljóðmúrin og fekk alt at svinga. Millum Hank Williams fjepparar var hetta avgjørt besti partur í triðja setti.

Undan Ragnari høvdu bæði Hallur og Rannvá hvør sín føroyska sang við í skránni. Tað var gott og bar við sær neyðuga frámerkið um, at vit vóru í Føroyum og ikki vilst á fremmandum heiðum. Sum føroyskur lurtari krevji eg eitt føroyskt frámerki. Viðurkennandi tað góða í føroyskum, eigur tað at vera soleiðis. Eisini í einum kontrisangi. Hesa skrá valdi Ragnar ikki. Hann sang ongan heimligan sang. Tað høvdu mong væntað. Tí varð tað so snópisligt.

Ein konsert, ið var skipað øvut - tað besta beinanvegin - var komin at enda. Besta borgarliga dygdin á heiðini er at drýggja tað besta til síðst. Ja, sjálvur bygnaðurin í einum ektaðum kontrisangi er at dyrka hitt allar síðsta við einaru krúllu á halanum. Tað hava vit til góðar, tá næsta kontrikonsert verður. Og kanska skuldu fyrireikararnir gjørt meiri burtur úr bluegrass.

Í summar hava The Isaacs latið oyruni upp hjá mongum fyri hesi frálíku hevd, sum føroyskar fríkirkjuligar sangbøkur altíð hava átt stóran lut í. Betesda kvartettin kundi verið ultimativa føroyska boðið uppá eina bluegrasskvartett til næstu ferð. Spyrst, so livst.

Δ



*Við Rannvu Vesturklett og Twilight byrjaði dysturin millum djúpa kontriskaldskapin og heiladeyða dansitónleikin*



*Fyri mong var konsertin leygarkvøldið Norðurlandahúsinum ein mentanarpolitisk staðfesting av, at kontritónleikur umsíðir er sloppin til háborðs, metir Birgir Kruse, ummælari*

# Kontri til háborðs

Leygarkvøldið fegnaðust mong um, at kontritónleikur varð sloppin inn í Norðurlandahúsið, skrivar Birgir Kruse á sínum bloggi, birkblog.blogspot.com. Eitt *statement*, tey settu ájavnt við almennan mentanarpolitikk. At kontritónleikur endaliga varð góðtikin av teim ráðandi í Havn.

- Ja, nú eru vit sloppin til háborðs, segði ein kontrifjeppari so hjartansfegin og javnmetti pallseting og tónleikarar við Grand Ole Opry, skrivar Birgir Kruse.

**Kontrikrás**

Felagið Faroesound skipaði fyri konsertini, har Hallur Joensen, Ragnar í Vík og Rannvá Vesturklett vóru høvuðsnøvnini.

Hall Joensen kenna vit millum annað frá fløguni "Pickin time in Nashville", sum kom út fyrr í ár. Fløgan seldi alt fyri eitt meir enn 4000 eintøk, og løg sum "Give my love to Rose" og "Kyss ein eingil hvønn morgun" gjørdust skjótt sokallað hitt í Føroyum-

Ragnar í Vík hevur higartil givið tríggjar fløgur út, har tann seinasta "Lagnulogin" er á føroyskum við orðum og løgum, sum Ragnar sjálvur hevur gjørt.

Rannvu Vesturklett kenna vit millum annað frá kontribólkinum Twilight, sum hon hevur sungið til dans saman við seinnu árini.

Tónleikararnir á konsertini vóru annars Ólavur Øster sologittar, Pauli Magnussen kontrabass og elbass, Jónleif Jensen trummur, Jógvan Olsen, keyboard, Arnbjørn Sivertsen, elgittar, Daniel Nilesen fiól, Petur Hermansen steelgittar og Joan Petur Hansen (Beddi) á mandolin.

Afturat sær sum kórsangara hevði Hallur Joensen Kristinu Bærentsen, meðan Píl Reinert sang kór hjáRánnvu Vesturklett.

**-ave-**